UTTAN ÚR HEIMI

# Fýra forsetar fylgdu



*Ikki færri enn fýra amerikanskir forsetar vóru í kirkjuni, tá einkjan eftir Martin Luther King, Coretta Scott King, fór til gravar í gjár. Frá vinstru síggjast George W. Bush, Laura Bush, Bill Clinton, Hillary Clinton, George Bush eldri og Jimmy Carter. Coretta Scott King, sum doyði tann 31. januar, fór til gravar úr New Birth Missionary Baptist Church í Lithonia, sum er beint uttan fyri Atlanta í statinum Georgia*

*Mynd: Reuters*

# Vil ikki leggja frá sær

**Uffe Ellemann-Jensen heldur, at blaðstjórin á Jyllandspostinum eigur at siga seg úr starvi. Men tað ger hann ikki**

DANMARK

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Carsten Juste gjørdi í gjár greitt, at hann ætlar sær ikki at gera eftir tilmælinum frá fyrrverandi uttanríkisráðharranum.

– Hatta fær meg als ikki at hugsa um mítt starv, sigur Carsten Juste við Politiken.



*Carsten Juste vil ikki leggja frá sær*

*Mynd: Reuters*

Uffe Ellemann-Jensen skrivaði í einari grein í Jyllandspostinum í gjár, at blaðstjórin eigur at leggja frá sær. Hann vísti á, at Carsten Juste hevur sagt, at hevði hann vitað, at tekningarnar av Muhammed profeti, fóru at elva til tílíkt tok, vóru tær ongantíð komnar í blaðið.

– Uffe Ellemann-Jensen tulkar hetta, sum at eg havi sagt, at eg iðri meg um, at tekningarnar komu í blaðið. Tað geri eg ikki, og tað var heldur eingin, sum dugdi at siga, at málið fór at elva til hetta stríðið, sigur blaðstjórin.

– Serfrøðingar siga, at tilburðirnir teir seinastu dagarnar hava einki við tekningarnar at gera. Tað snýr seg um nakað heilt annað, og tí hevði tað ikki ávirkað støðuna, at eg legði frá mær, sigur Carsten Juste.

# Funnu Edens garð

**Á Papua í Indonesia hava vísindafólk funnið djór og plantur, sum eingin hevur sæð fyrr**

NÁTTÚRA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Altjóða granskarar hava funnið tað, teir kalla "ein gloymdan heim" á Papua í Indonesia. Í einum fjarskotnum frumskógarøki hava teir funnið minst tjúgu djóra- og plantusløg, sum eingin hevur sæð fyrr. Har eru eitt nú froskar, summarfuglar og plantur. Harafturat funnu granskararnir eitt fuglaslag, sum etur húnang, og teir komu eisini fram á fleiri djór, sum eru at kalla útdeyð aðrastaðni í heiminum, men sum tykjast trívast væl í frumskóginum á Papua.

– Her eru vit so nær Edens garði, sum vit kunnu koma, sigur granskingarleiðarin Bruce Beehler við BBC og leggur afturat, at djórini góvu sær ikki stórvegis far um granskararnar. Eitt nú kundu granskararnir uttan stórvegis hóvasták taka tvey djór við sær til nærri kanningar, uttan at tey gjørdu mótstøðu ella flýddu.

Granskaraliðið telur ellivu fólk úr USA, Avstralia og Indonesia. Í desember fóru tey inn í tann gamla frumskógin á Papua vestantil á Ný Guinea.

– Har eru ongar gøtur, og vit sóu ikki eitt einasta tekin um, at fólk hava verið har fyrr. Hetta er eitt vakurt og óspilt øki, sigur Bruce Beehler, sum umboðar amerikanska umhvørvisfelagsskapin Conservative International.

Hann ivast ikki í, at nógv annað forvitnisligt er at finna í frumskóginum. Granskararnir høvdu tveir menn av Papua við sær, og teir vóru eisini bilsnir av tí, sum teir sóu, og teir vistu eisini at siga, at eingin hevði verið inni í frumskóginum fyrr.

## Skemta við jødatýningini

Eitt blað í Iran hevur gjørt av at bjóða lesarum sínum at taka lut í einari teknikapping, ið er ætlað sum svar upp á Muhammedstekningarnar í Jyllandspostinum.

Jødatýningin undir seinna heimsbardaga er evnið, og leiðslan á blaðnum Hamshahri sigur, at við hesum ætlar hon at kanna, hvussu langt pressufrælsið í Vesturheiminum røkkur, og um vesturlendsk bløð fara at prenta tekningarnar.

– Nú fáa vit so at síggja, um pressufrælsið í Vesturheiminum er tað sama, tá tað snýr seg um brotsverk hjá USA og Ísrael ella jødatýningina, ella um tað bara er loyvt at gera seg inn á átrúnaðarligar halgidómar, skrivar blaðið.

Teknikappingin hjá Hamshahri byrjar í næstu viku, og tekningarnar verða samstundis sýndar í einari framsýningarhøll. Sambært AP eigur Teheran kommuna bæði blaðið og framsýningarhøllina.

## Sigldi undan fólki í neyð

Skiparin á einari egyptiskari ferju hevur viðgingið, at skip hansara sigldi fram við fólki av einari ferju, sum sakk seinasta hóskvøld, men at hann valdi at halda leiðina fram.

Umleið 1.000 fólk doyðu, tá ferjan "Al Salam Boccaccio 98" sakk í Reyðahavinum. Egyptisku myndugleikarnir siga, at skiparin rópti á ferjuna "Saint Catherine", sum var á somu leið, og bað um hjálp, tí eldur var í skipinum. Men "Saint Catherine" steðgaði ikki á at hjálpa teimum neyðstøddu.

– Eg gjørdi av at halda leiðina fram, tí eg helt trygdina hjá teimum 1.800 ferðafólkunum umborð á skipinum vera tað týdningarmesta. Veðrið var eisini ólagaligt, sigur skiparin á "Saint Catherine", Salah Jomaa.

Avgerðin hjá skiparanum er steinur oman á byrðu hjá egyptiska reiðarínum, sum hevur nóg mikið at hugsa um frammanundan. Tað er komið fram, at reiðaríið drálaði alt ov leingi við at biðja myndugleikarnar um hjálp, tá eldur kom í "Al Salam Boccaccio 98", og ferðafólk hava greitt frá, at skiparin rýmdi av skipinum fyri at bjarga sær sjálvum.

## Feitur matur ikki so vandamikil

Í mong ár hevur feitur matur fingið skyldina fyri bæði eitt og annað so sum bróstkrabba og hjartasjúkur, men nú vísir ein stór kanning, at tað er ikki so vandamikið kortini at eta feitan mat.

48.000 kvinnur hava tikið lut í kanningini, og úrslitið er nú kunngjørt í amerikanska læknatíðarritinum Jama. Sagt verður, at 19.000 kvinnur fingu mat við lítlum fitiinnihaldi, meðan hinar 29.000 fingu vanligan mat. Eftir átta árum høvdu 3,4 prosent av teimum, sum ótu soltnan mat, fingið bróstkrabba, meðan 3,6 prosent av teimum, sum ótu vanligan mat, høvdu fingið somu sjúku.

Kanningin avdúkaði eisini, at 0,13 prosent av teimum, sum høvdu etið soltnan mat, høvdu fingið krabbamein í tarmunum, og at 0,12 prosent av hinum høvdu fingið somu sjúkuna. Tilburðirnir av hjartasjúkum vóru ávikavist 0,86 og 0,88 prosent, skrivar Jama.

## Stór longa

Útróðrarmaðurin Thomas Ask úr Lindås nærhendis Bergen var greiður yvir, at hann hevði ein stóran fisk á snørinum, tá hann var á útróðri fyrradagin.

Saman við einum øðrum manni var hann farin at royna eftir longu á 40 favna dýpi, har longan gýtir um hesa tíðina. Teir høvdu fingið nakrar longur og ætlaðu sær til hús, tá Thomas Ask brádliga kendi. Tað var týðiligt, at hetta var okkurt stórt, og tá loddið kom á borðið, vísti tað seg at vera ein sjáldsama stór longa. Tá teir komu til lands, vísti tað seg, at longan var 155 centimetrar til longdar og vigaði góð 46 pund.

Molva molva, sum longa eitur á latíni, kann blíva tveir metrar long og kann viga upp í 80 pund, og tær elstu verða umleið 25 ára gamlar.